# AGA- & ETISKANEVNDIN

**KÆRA 8/2025**

| ***FSF-skrivstovan upplýsir Aganevndini:*** | |
|---|---|
| **Málsheitið: ÍF kærir EB/Streym fyri brúk av ólógligum leikara, 2. deild menn** | |
| Deild: 2. deild menn | Hvør hevur reist málið: ÍF |
| Kapping: Landskapping | Nevndin móttikið kæru: 17.10.2025 |
| Møguligt brot framt: 4. oktober 2025 | Kærugjald goldið: Nei |
| Partshoyring: Ja | 5 daga kærufreist hildin: Ja |
| Áheitan um munnliga viðgerð: Nei | Starvsnevndarummæli: Ongar viðmerkingar |

| **Úrskurður** |
|---|
| Aga- og etiskanevndin staðfestir, at kærugjaldið á kr. 1.000 sambært grein 8 í Aga- og etiskureglugerðin ikki er móttikið. Av hesari orsøk verður kæran avvíst og ikki viðgjørd. |
| **Kæran, partshoyringin og møguligt Starvsnevndarummæli** |
| EB/Streymur hevur ikki sent frágreiðing inn til FSF í samband við kæruna frá ÍF. |
| **Heimildir hjá Aga- og etiskunevndini at viðgera málið** |
| Vísandi til grein 2, 3 og 5 í Aga- og etiskureglugerðini hjá FSF, hevur Aga- og etiskanevndin málsføri at viðgera hetta mál. |
| **Fakta í málinum** |
| Skrivstovan hjá FSF hevur upplýst málið og staðfest at kærugjaldið ikki er móttikið. Skrivstovan hevur upplýst kæraranum um manglandi kærugjaldið tann 7. oktober 2025 umframt eisini at hava vegleitt kæraranum um hvar kærugjaldið skal flytast. Hóast hetta er onki kærugjald móttikið. |
| **Lógarverkið** |
| Ásett er í grein 8 í Aga- og etiskureglugerðin, at við kæruni til Aga- og etiskunevndina skulu fylgja kr. 1.000, sum verða afturgoldnar, um kæran vinnur sømdir. |
| **Staðfestingar, metingar og niðurstøða** |
| Aga- og etiskanevndin staðfestir, at kærugjaldið á kr. 1.000 ikki er móttikið. Av hesari orsøk verður kæran avvíst og ikki viðgjørd. |
| **Kæruvegleiðing** |
| Úrskurðurin kann ikki kærast til Yvirkærunevndina. |
| **Staður, dagfesting og undirskrift:**<br><br>**Tórshavn 18. oktober 2025**<br>Eli Thorsteinsson<br>Eli Thorsteinsson<br>formaður |
| Í Aga- og etiskunevndini eru: Eli Thorsteinsson, formaður, Ken Nónklett, næstformaður, Anni á Hædd, løgfrøðingur, Jóhan Troest Davidsen, løgfrøðingur, Birita Sandberg Samuelsen, løgfrøðingur |